Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Ferðaætlanin hjá Hasfjord og Teistanum

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at halda fram við verandi ferðaætlan um Skopunarfjørð, har bæði Hasfjord og Teistin sigla allar dagar í vikuni?
2. Um ikki, hví skal skipanin, sum tykist rigga væl, broytast aftur?
3. Hvør er meirkostnaðurin av verandi skipan?
4. Hvør er meirinntøkan av verandi skipan?

Viðmerkingar:
Nú Ternan hevur røkt siglingina fyri Teistan, meðan Teistin hevur verið til eftirlit, hevur eisini Hasfjord havt eina betri ferðaætlan. Sjey dagar um vikuna og tveir túrar afturat dagliga. Henda ferðaætlan hevur verið ein munagóður bati hjá fólki og farmi um Skopunarfjørð.
Røðirnar á Gomlu Rætt og í Skopun hava verið væl styttri, og trongsulin til bilparkering á Gomlu Rætt hevur ikki verið so út av lagi. Eisini hevur nøgdsemið millum brúkararnar, sum dagliga brúka farleiðina, verið nógv betri.
Alt í alt ein nøktandi skipan til Sandoyartunnilin er liðugur.
Tí kundi verið ynskiligt, at verandi sigling hjá Hasfjord og Ternuni helt fram, tá Teistin aftur er tøkur til siglingina, og til heystfrítíðin er av. Also, at Hasfjord siglir sum nú, samstundis sum Teistin fer í sína regluligu sigling aftur.
Hóast verandi ferðaætlan riggar væl, so ljóðar, at siglingin aftur skal skerjast, nú summarfrítíðin er í hondum.
Tí hesar spurningar til landsstýrismannin.

Á Løgtingi, 23. juni 2021

Páll á Reynatúgvu